# Sjarmerandi og vælgerandi

**– Í dag spyr eingin um kirkjuligu bakgrundina, segði prestur, tá ið hann setti hol á vælgerandi konsertina í Christianskirkjuni. Konsertin var sjermerandi við góðum og fjølbroyttum tónleiki, og tá ið 75 ára gamli Finnur Hansen treiv í »Undurfulla land«, fóru fólk á føtur**

KONSERT
*Eyðun Klakstein*


*Tá ið Finnur Hansen sang um undurfulla landið í eini fullsettari Christianskirkju, fóru fólk á føtur.*

*Myndir: Bárður Lydersen*

Tað vóru kend nøvn á plakatini, tá ið konsertir fyri gøtubørn í Suðurafrika vórðu hildnar í Klaksvík og í Havn farna vikuskiftið.

MC Restorff, Finnur Hansen, I AM, Brandur Enni, Kristel Lisberg og Torkil Mørkøre vóru millum tónleikararnar og sangararnar, sum vildu taka eitt tak fyri einum vælgerandi endamáli.

Konsertin í Christianskirkjuni leygardagin savnaði nógv fólk. Allar tríggjar hæddirnar í kirkjuni vóru fyltar við fólki, og hóast okkurt einstakt setur var tøkt, so var talan um eina mest sum stappaða kirkju.

Um tað var nakað serstakt sum dró hesi mongu fólk á konsert, er ilt at siga. Kanska var tað blandið av tónleikarum og sangarum, sum vóru á skránni, sum lokkaðu tey mongu fólkini.

## Nýggjur sangari í I AM

Konsertin var hugalig og sjarmerandi. Alt sat ikki, sum tað skuldi reint tónleikaliga, men tað vóru fólk við góðum gávum, sum spældu og sungu.

MC Restorff legði fyri, og hann var ein góða byrjan. Hann innleddi við einum sangi hjá Roberti Joensen, og nú hann var farin so langt av heimalið, so hevði hann fingið ein klaksvíking í Eysturoynni, Eyðun Jacobsen, at spæla saman við sær.

Rockbólkurin I AM hevur verið eitt tað heitasta navnið í føroyskum tónleiki seinastu vikurnar, og teir vóru eisini til konsertina – í hvussu er teir flestu av teimum.

Sangarin í bólkinum, Birgir Sigurðsson, sum er búsitandi í Danmark, kundi ikki verða við til konsertina, og tí var tað vanligi keyboard-spælarin í bólkinum, Heðin Olsen, sum sang fyri á tveimum sangum, og síðani var Brandur Enni gestasangari til sangin Friðsæla stund.

## Torkil fangaði

Tað kann kanska verða líkamikið at taka dagar ímillum tær ymsu framførslurnar tá ið talan er um slíka vælgerandi konsert, har endamálið vigar tyngri enn nakað annað. Men tað ber illa til at sleppa út um bólkin, sum Torkil Mørkøre hevði mannað til konsetina. Teir spældu væl, og sangirnir vóru fangandi og spennandi. Nógvir góðir tónleikarar spældu undir, og bæði samanspælið og kórið var gott. Hendan bólk høvdu nógv ivaleyst viljað hoyrt til eina nýggja konsert, har teir fingu meira pláss.

Millum tónleikararnar í bólkinum vóru Mikkjal Hvannastein, Ingi Isaksen, Kristoffur Mørkøre og Leivur Vitalis, og teir eru kendir úr nógvum øðrum tónleikaligum samanhangum.


*MC Restorff hevur ikki sungið ofta í Klaksvík, men leygardagin hevði hann hættað sær norður*


*Magni Christiansen syngur, meðan Hans Eiler Hammer, sum var ein av fyrireikarunum, lesur upp á. Hans Eiler var frásøgumaður til konsertina*




*Heðin Olsen royndi seg sum sangara í I AM, nú vanligi sangarin ikki kundi vera við*

## Finnur fekk fólk á føtur

Finnur Hansen og familja løgdu veruliga nakað eftir seg á konsertini í Christianskirkjuni. 75 ára gamli Finnur Hansen er kendur sum ein góður og inniligur gospelsangari, og hóast hann er komin nakað upp í árini, so spardi hann seg ikki á konsertini.

Hann sang av hjartað, og tá ið sangurin »Undurfulla land« var á skránni, fóru fólk á føtur, og so varð bæði sungið við og klappa.

Tríggjar abbadøtrar, Vanja, Laila og Barbara, sungu eisini nakrar sangir, og tað er eyðsýnt, at tónleikur er gingin í arv í familjuni.

Faðir og dóttir úr einari aðrari familju sungu eisini. Jens og Kristel Lisberg hava áður framført saman á konsertum og hava eina á skránni í Havn komandi vikuskiftið, og tey sungu eisini í Christianskirkjuni. Ungu songkvinnan hevur eitt stórt talent, og tað man hon hava arvað frá pápa sínum, sum hevur verið kendur sangari í nógv ár.

## Fjølbroytt men gott

Magni Christiansen hevði mannað ein bólk til konsertina, og hann var síðstur at spæla. Magni spældu kristnan gospeltónleik, og tað ger hann væl. At hann so er íðin Manchester United viðhaldsmaður, og felag hansara júst hevði tapt ein dyst, áðrenn hann skuldi spæla, forðaði honum ikki.

Konsertin var frálík sum vælgerandi konsert. Nøvnini og tónleikurin vóru fjølbroytt, og allar framførslurnar vóru sjarmerandi á hvør sín hátt. Hóast tónleikaligi teinurin kanska var drúgvur millum tey ymsu nøvnini, so ber tað til hjá tónleikarum at taka saman hendur til eitt slíkt vælgerandi endamál og samstundis fáa nakað gott tónleikaligt burturúr.


*Carlsen-systrarnar sungu nakrar sangir*

*Mynd: Finnur Justinussen*


*Torkil Mørkøre og hansara menn høvdu eina frálíka framførslu, og tað hevði verið stuttligt at hoyrt bólkin aftur á konsert*

# 130.000 í kassanum

**Vælgerandi átakið fyri sjúk børn í Suðurafrika hevur higartil givið slakar 130.000 krónur, men enn ber til at lata pengar**

INNSAVNING
*Eyðun Klakstein*

Um vikuskiftið vóru tvey stóru tiltøk í Klaksvík og í Havn, sum høvdu sama endamál. Nevniliga at savna pengar inn sjúk børn í Suðurafrika.

Vælgerandi konsertirnar, sum vórðu hildnar í Christianskirkjuni og í Vesturkirkjuni, spældu væl av.

– Vit høvdu spælt okkum eitt sindur við tankan um, hvat kundi koma inn til slíkar konsertir, men eg má siga, at tað, sum kom inn, er væl omanfyri tað, sum vit høvdu væntað, sigur Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í Klaksvík, sum saman við Sámali Bláhamar og Steintór Rasmussen skipaði fyri.

## Barnaheim og gøtubørn

Leygardagin komu góðar 41.000 krónur í talvurnar, sum gingu í Christianskirkjuni, og sunnudagin vóru 46.000 lætnar í talvurnar í Vesturkirkjuni.

Frammanundan vóru pengar komnir inn frá eini stuðulskonsert í kirkjuni á Tvøroyri, og nakað var eisini lat beinleiðis á konto í peningastovnunum.

Mánakvøldið var savnaða upphæddin 129.000 krónur, og fram til 1. februar ber tað til at lata pengar til tiltakið.

Pengarnir, sum verða savnaðir, fara óskerdir til børn í Cape Town í Suðurafrika. 100.000 krónur verða lætnar til Nazareth-barnaheimið, sum hýsir børnum, sum eru sjúk av AIDS ella smittað av HIV.

Tað, sum er omanfyri 100.000 krónur, verður latið til ein felagsskap, sum kallast My Life, og sum arbeiðir millum gøtubørn í sama býi.

– Vit eru sera væl nøgdir við undirtøkuna, sum hetta átakið hevur fingið, sigur Hans Eiler Hammer.

Maersk Air

Tilboðsferðir til Danmarkar

Føroyar–Keypmannahavn t/r (í mesta lagi 4 dagar) 1863,-
Føroyar–Billund t/r (í mesta lagi 4 dagar) 1898,-

Føroyar–Keypmannahavn t/r (í mesta lagi 14 dagar) 2363,-
Føroyar–Billund t/r (í mesta lagi 14 dagar) 2398,-

Bílegg ferðaseðlarnar hjá Maersk Air ella á einari av ferðaskrivstovunum kring landið.

Íroknað er ferð fram og aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á kr. 220,- kemur aftrat prísinum.
Børn 2–15 ár 33% – børn 0–1 ár 90%. Galdandi tíðarskeiðið 8. januar–29. mars 2004.

REPROZ

Handilskjarnin I Niels Finsensgøta 8
FO-100 Tórshavn I Tel 35 74 74 I Fax 35 74 75

MAERSK AIR
It's got to be perfect